



*Úr 400 ára gomlu húsum sínum í hjartanum av elsta býarpartinum í Valletta hava Joanna og Henry útsýni yvir vakra havnalagið, ið ferðafólkaskipini dagliga vitja á síni ferð í Miðjarðarhavinum*
*Myndir: privat*





prátið kemur inn á ferðavinnu, ferðasamband og kostnað. Ryanair hevur snøgt sagt givið Malta luft undir veingirnar, felagið hevur gjørt risa íløgur í floghavnina á oynni, og hevur hvørja viku 120 fráferðir til og av Malta til 20 býir í Evropa. Prísurin fer ongantíð hægri enn nakrar fáar hundrað krónur.

Eg lovi at flyta tykkum eina millión ferðandi til Malta um árið, skal O'Leary hava sagt í samráðingunum við maltesisku myndugleikarnar í vár, og hetta lyfti sæst aftur í ferðavinnuni, sum er høvuðsvinna á Malta. Onnur lágprísfeløg hava somuleiðis sæð møguleikar í Malta, og turru tølini yvir ferðandi um floghavnina stuðla undir smílini hjá mongu maltesarunum, ið liva av ferðavinnuni. Fyrstu tríggjar ársfjórðingarnar í ár fóru 2,6 milliónir fólk um einastu floghavnina á oynni, og hóast altjóða fíggjarkreppan hevur rakt ferðavinnuna nógvastaðni, so er ferðafólkatalið á Malta økt millum 15 og 19 prosent í summar, sammett við fjørsummar.

Eisini Joanna og Henry fegnast um møguleikarnar, sum bíligu ferðaseðlarnir hjá lágprísfeløgunum geva.

- Ímynda tær at fara ein svipp til ein evropeiskan stórbý fyri nakrar fáar hundrað krónur. Vit búgva í einum lítlum oyggjasamfelag, men eru kortini so nær við umheimin, at vit uttan stórvegis kostnað kunnu uppliva stórbýir og onnur spennandi støð. Tað ger tað nógv meira áhugavert at búgva her, siga tey bæði í ein munn, og byrja í sama andadrátti at fortelja um ferðina til Venedig herfyri.

Hetta tykist vera breiða fatanin millum manna. Bøtta og bíliga ferðasambandið hevur av álvara fingið hjólini at mala skjótari, og tað merkist allastaðni hjá teimum, sum hava nakað við ferðavinnu at gera - tað veri seg á gistingarhúsunum, matstovunum, teimum sum skipa fyri útferðum, hýruvognsførarum og so framvegis. Ella, sum ein smílandi hýruvognsførari tók til tann eina dagin: Ryanair gevur mær ovmikið av arbeiði og harvið góða inntøku, og so fái eg eina bíliga feriu uttanlands omaná tað heila.

## Riddari í Valletta

Henry hyggur at klokkuni. Hann hevur eina avtalu við eitt filmsframleiðslulið, sum vil hava statistarnar til ein komandi spælifilm at møta upp og royna búnarnar. Malta er tiltikið fyri sítt góða og støðuga veðurlag, her skínur sólin 250 dagar um árið, og tað gevur filmsframleiðarum best hugsandi arbeiðsumstøður. Síðani sjeytiárini hevur films- og lýsingarvinnan nýtt Malta til upptøkur, og millum ár og dag eru ikki so fáir Hollywood filmar tiknir upp á Malta. Av teimum kendastu kunnu nevnast stórfilmar sum "Greivin av Monte Cristo", "Gladiator" og "Alexander." Javnan verða heilir býlingar broyttir, pyntaðir og brúktir til leiktjøld í einum filmi, og ikki so sjálvdan uppliva íbúgvarnir herflogfør í "bardaga" í maltesiska loftrúminum ella stór sjórænara- ella krígsskip á vágni. Og enn minnast mong maltesisk kvinnuhjørtu aftur á, tá Orlando Bloom og Brad Pitt spákaðu í gøtunum í fríløtunum millum upptøkurnar til "Troy". Virksemið hjá filmsvinnuni kastar eisini væl av sær til maltesiska samfelagið, bæði í umrøðu og virksemi – og so eru eisini fitt av fólki knýtt at feløgunum, sum útvega filmsliðunum statistar.

Tað gongur skjótt fyri seg við búnunum, og ein tíma seinni er Henry tilnevndur riddara. Ein treyt er tó, at hann letur rakiknívin liggja og skeggið vaksa til upptøkurnar, sum fara fram um nakrar vikur.

- Tað er ótrúliga stuttligt at vera við og á henda hátt fáa eitt sindur av innlit í filmsframleiðslu og hvussu arbeitt verður, sigur Henry, sum er fastur fúsur sum statistur, hvørja ferð boð eru eftir honum.

Higartil er tað blivið til tríggjar leiklutir, tvær ferðir í filmsframleiðslu og einaferð til eina lýsing.

## Frískt fyri eina fimmkrónu

Tey flestu, sum hava vitjað sunnaru breiddarstigini, munnu minnast aftur á friska grønmetið og fruktina, ið seta sín serliga dám á máltíðirnar. Í so máta er Malta eitt Mekka.

Sunnumorgnar plaga Joanna og Henry at leita sær teir fáu kilometrarnar til havnabýin Marsaxlokk, ið er tiltikin fyri sín festa fisk, grønmeti og frukt. Á marknaðinum ber til at keypa tær frískastu vørurnar fyri ein bíligan penga.

- Tað er sera hugnaligt at fara á torgið sunnumorgnar, og góðu rávørurnar gera tað eisini sera hugaligt at matgera, siga tey bæði við ein munn.

Kostnaðarstøðið er rímuligt á Malta, tað er bíligt at búgva og liva á oynni, og sjálvt frískastu vørurnar fáast fyri lítið og lætt á torginum.

- Hetta er absolutt eitt stórt pluss við at búgva á Malta. Eisini er Valletta ein sera áhugaverdur býur við nógvari mentan og list, og fólkið er sera fitt og fryntligt. Og so ger tað ikki støðuna verri, at her eru 250 sóldagar um árið at njóta góðu strendurnar, sigur Henry.

Áðrenn kambsdalsbúgvin flutti til Malta, búði hann útvið fýra ár í Danmark.

- Tað, sum mær mest leingist eftir í Føroyum eru vinir og familja, og onkuntíð eru grønu fjøllini í huganum. Men eg fór uttanlands fyri at víðka sjónarringin, og tað geri eg so avgjørt her á Malta, leggur hann afturat.

Tað er langt av dalinum innanfyri Varmakeldueiði suður til vermandi keldurnar í Valletta. Joanna og Henry vóru fyrstu ferð í Føroyum saman í summar, og eisini fáa tey javnan vitjan av familju og vinum heimanifrá. Harafturat gevur internetið góðar møguleikar at fylgja við í føroyska samfelagnum.

- Eg má viðganga, at í løtuni havi eg trupult at ímynda mær, at vit búseta okkum í Føroyum, sigur Henry og leggur við einum skálkabrosi afturat:

- Men føroyingur fer man altíð at vera.